**Samandráttur av fundarsamtykt hjá Hvalbiar Kommunu tann 17. juli 2012**

Møtt: Otto West, Trygvi Midjord, Martin í Nesi, Niels Olaf Eyvindsson,
Herdis Jensen, Rúni Thomsen og Niels J. Thomsen.

Síðani fundarskráin fór út, eru 3 mál komin inn - og koma hesi sum mál 5, 6. og 7 á skránni.

| | |
|---|---|
| **Mál 1:**<br>**Skriv viðv. gerð av garði á matr. nr. 29g.** | Til 1:<br>Samtykt varð at stoypa garð framvið vegnum við matr. nr. 29g. |
| **Mál 2:**<br>**Agenda-21 stovan - umboð til samskipandi bólk viðv. menningarætlan fyri Suðuroy.** | Til 2:<br>Samtykt varð at velja Rúna Thomsen í bólkin til fyrireikingar av menningarætlan. |
| **Mál 3:**<br>**Mál frá Vega- og havnanevndini t.støðutakan.**<br>**a) Bryggjan í Sandvík.**<br><br><br>**b) Hólavegurin.**<br><br><br>**c) Hamranes.** | Til 3:<br><br>a) Tilboð innkomin frá Articon og SH-Bygg, uppá ávikavist kr. 524.659,- og kr. 318.500,-. Samtykt at taka av tí lægra frá Sp/f SH-Bygg.<br>b) Vega- og havnanevndin mælir bygdarráðnum til at fáa HMP Consult at bjóða arbeiðið út. Samtykt varð at fylgja tilmælinum.<br>c) Í sambandi við plásstrot til frystibingjur, er møguleikin kannaður fyri javnan av vestara brimgarði norðureftir móti dráttinum. Samtykt varð at fáa eina kostnaðarmeting av hesari loysnini. |
| **Mál 4:**<br>**Innkomin boð uppá jarðarstykki til at heysta.** | Til 4:<br>Trý boð eru innkomin uppá jørð at heysta, øll uppá hvør sítt stykki. |
| **Mál 5:**<br>**Skriv um alment innlit.** | Til 5:<br>Trý skriv innkomin um alment innlit í ymisk mál. Samtykt varð at geva alment innlit. |
| **Mál 6:**<br>**Skriv viðv. matr. nr. 182e, Hvalba.** | Til 6:<br>Samtykt at boða frá, at Hvalbiar Kommuna hevur somu prísir fyri grót sum Landsverk, um kommunan fyllir bilarnar. Um ein fyllir grótið sjálvur, verður tað útroknaður prísur. |

| | |
|---|---|
| **Mál 7:**<br>**Umsókn um byggiloyvi til leingjan av hjalli á matr. nr. 21c í Nesi.** | Til 7:<br>Samtykt varð at geva byggiloyvi út frá givnum upplýsingum. Grannaloyvi var viðlagt. |